Vinnumálaráðið

Dagfesting:	28.04.2026
Mál nr.:	25/28459
Málsviðgjørt:	JM
Ummælisfreist:	15.01.2026 - 01.02.2026
Eftirkannað:	23.04 2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu (Fuglaveiðulógin)
(Heimild at skjóta grágás og brandgás)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu (Fuglaveiðulógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 7. mai 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftan á § 17 verður sett:

"**17 a.** Uttan mun til ásetingarnar í § 17, stk. 1 og 2, kann tann, sum eigur, festir ella leigar lendi, søkja um loyvi at skjóta grágás og brandgás á hesum lendi, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av slíkum. Landsstýrisfólkið kann áseta eitt ovara mark fyri talið á grágás og brandgás, sum skjótast kann.
Stk. 2. Loyvi eftir stk. 1 er treytað av, at umsøkjarin hevur vápnaloyvi og váttar at kenna fuglin, sum loyvið fevnir um.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur í loyvinum nærri treytir fyri at skjóta grágás og brandgás, undir hesum nær loyvt er at skjóta grágás og brandgás, loyvd skotvápn og lóður, at tann, ið hevur loyvi, skal boða frá, hvussu nógv grágás og brandgás er skotin, og at fuglurin skal latast myndugleikunum til kanningar uttan viðurlag, um biðið verður um tað. Loyvishavin skal hava loyvi uppi á sær, tá ið skotið verður.
Stk. 4. Tann, sum hevur fingið loyvi at skjóta grágás og brandgás eftir stk. 1, kann loyva einum øðrum persóni at skjóta grágás og brandgás á tí øki, sum loyvið fevnir um, treytað av, at viðkomandi hevur søkt um og fingið loyvi frá landsstýrisfólkinum.
Stk. 5. Loyvi eftir stk. 4 skal vera skrivligt, og loyvishavarin skal hava hetta loyvið og loyvið eftir stk. 1 hjá sær, tá ið skotið verður. Loyvið skal vísast politinum, um biðið verður um tað."

2. Í § 17 b, 1. pkt., verður aftan á "grágás" sett: "og brandgás".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2031.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Sólseturásetingin, sum loyvdi teimum, ið eiga ella leiga velt lendi, at skjóta grágás (*Anser anser*), er farin úr gildi. Fyri aftur at loyva teimum, ið varða av veltum lendi, at skjóta grágás og brandgás (*Branta leucopsis*), sum eru til bága fyri landbúnaðin, er neyðugt at seta § 17 a í fuglaveiðulógini í gildi aftur og víðka heimildina til at skjóta fugl, sum er til ampa, til eisini at fevna um brandgás. Samstundis verða teljingarnar víðkaðar til eisini at fevna um brandgás.

1.2. Galdandi lóggáva

Tað er eftir galdandi lóggávu bannað at skjóta bæði brandgás og grágás. Til 1. januar 2026 bar til at søkja um og fáa loyvi til at skjóta grágæs, sum vóru til ampa fyri landbúnaðin.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva, at grágás og brandgás verður skotin í ávísan mun. Vinnuligur landbúnaður hevur stóran fíggjarligan miss av, at stórir flokkar av grágás og brandgás eta avgrøðina, men eisini frítíðarlandbúnaðurin er fyri missi, orsakað av gæsnum. Mett verður, at tað skal vera møguligt hjá hesum bólkum at skjóta grágás og brandgás undir teimum treytum, sum tað varð loyvt at skjóta grágás eftir í § 17 a í løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu.

Við lógarbroytingini verður heimilað at skjóta grágás og brandgás í ávísum førum og við ávísum treytum. Kortini er tað so, at grágás og brandgás í ávísan mun skulu verjast, og tí er bara loyvt at skjóta, meðan fuglurin er á veltum lendi. Grágás og brandgás verða sostatt framvegis friðaðar fyri skjóting og veiðu á óveltum lendi. Afturat hesum er enn sum áður ikki loyvt at skjóta hesar gæs, meðan tær bøla á eggjum.

Grágás og brandgás eru báðar fevndar av Bonn-sáttmálanum (Convention on Migratory Species of Wild Animals), sum m.a. ásetur, at villdjórasløg, sum regluliga ferðast um landamørk, skulu verjast, AEWA-avtaluni (Agreement on the Conservation of African-Eurasian Migratory Waterbirds) og sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (The Convention on Biological Diversity), sum Føroyar hava tikið undir við. At loyva teimum, ið varða av lendi, ið er ávirkað av hesum báðum gásasløgum, at skjóta grágás og brandgás, er ikki í sjálvum sær í andsøgn við omanfyri nevndu sáttmálar og avtalur, men tað er treytað av, at hetta er burðardygt. Til tess at fáa greiðu á, um hetta er burðardygt, er farið undir vísindaliga at kanna og telja grágás. Búnaðarstovan vísir á, at slíkar kanningar og teljingar skulu fremjast í eitt áramál upp á umleið fimm ár, um tær skulu kunna brúkast sum vísindaligt grundarlag fyri eini avgerð um at skjóta grágás. Tjóðsavnið er vegna Búnaðarstovuna farið undir teljingar av grágásastovninum í Føroyum. Tríggjar teljingar eru higartil gjøgnumførdar, og tað er ikki nóg stórt grundarlag fyri at kunna avgera, hvussu umfatandi ein burðardygg veiða av grágás kundi verið.

Fyri at kunna meta um, hvat ein burðardygg veiða av brandgás er, er tað tí somuleiðis neyðugt at fara undir at telja brandgás.

Búnaðarstovan metir, at fuglateljingar, sum skulu verða grundarlagið undir eini áseting um, hvat ein burðardygg veiða av grágás og brandgás er, eiga at verða endurtiknar fimta ella tíggjunda hvørt ár. Alt eftir teimum niðurstøðum, ið kanningar og teljingar vísa, kann talan vera

um bara at skjóta grágás ella brandgás fyri at verja lendið ella at loyva einari varligari veiðu. Í 2022 vóru taldar 1128 grágæs. Tølini fyri ávikavist 2023 og 2024 eru 994 og 1133 grágæs.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
§ 17 a í fuglaveiðulógini verður sett inn av nýggjum og verður víðkað til eisini at fevna um brandgás.

Heimildin hjá landsstýrisfólkinum í § 17 b í løgtingslóg um fuglaveiðu at stíla fyri at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás verða framdar, verður víðkað til eisini at fevna um brandgás.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Bóndafelag Føroya, Føroya Óðalsfelag, Djóraverndarfelagnum, Tjóðsavninum, Havstovuni og Føroya Fuglafrøðifelag.

Harumframt hevur uppskotið ligið frammi á heimasíðuni hjá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum og á ummælisportalinum frá 15. januar til 1. februar 2026.

Víst verður til hjálagda upprit um innkomnar viðmerkingar (fylgiskjal 6).

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella kommunurnar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur avmarkaðar umsitingarligar avleiðingar fyri landið, tí Búnaðarstovan skal viðgera og geva út loyvi til at skjóta grágás og brandgás, sum eru til ampa fyri landbúnaðin.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Fyri landbúnaðarvinnuna hevur lógaruppskotið ta avleiðing, at landbúnaðarvinnan lógliga kann fyribyrgja, at grágás og brandgás eta gróði á veltum lendi.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið gevur jarðareigarum, leigarum og festarum rættindi til at søkja um loyvi at skjóta grágás og brandgás á veltum lendi.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Grágás og brandgás eru fevndar av Bonn-sáttmálanum (Convention on Migratory Species of Wild Animals), sum m.a. ásetur, at villdjórasløg, sum regluliga ferðast um landamørk, skulu verjast, og av AEWA-avtaluni (Agreement on the Conservation of African-Eurasian Migratory Waterbirds) og sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (The Convention on Biological Diversity), sum Føroyar hava tikið undir við.

Vinnumálaráðið metir, at tað at skjóta grágás ella brandgás ikki í sjálvum sær er í andsøgn við omanfyri nevndu sáttmálar, men tað er treytað av, at talan er um burðardygga veiðu. Mett verður eisini, at ein avmarkað skjóting kann verða loyvd, so avgrøði o.a. fær frið, meðan neyðugu teljingarnar og kanningarnar verða gjørdar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Hoyvíkssáttmálan* (Sáttmáli ímillum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap, og *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið ásetur ikki skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið ásetur ikki gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur teimum, ið hava fingið loyvi at skjóta grágás og brandgás, skyldu at boða frá, hvussu nógvar gæs eru skotnar.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri treytir fyri at skjóta grágás og brandgás, undir hesum nær loyvt er at skjóta grágás og brandgás, loyvd skotvápn og lóður og fráboðanarskyldu.

Lógaruppskotið heimilar harumframt politinum at krevja, at tann, sum skjýtur grágás ella brandgás, skal vísa politinum loyvið, um biðið verður um tað.

Aðrar heimildir eru ikki í lógaruppskotinum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki myndugleikunum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Lógaruppskotið hevur við sær, at Búnaðarstovan fer at viðgera persónupplýsingar, tá tey skulu viðgera umsóknir og afturtøkur av loyvum at kunna skjóta grágás ella brandgás.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1
Ásetingin í §17 a, í lógaruppskotinum er lík teirri, sum var í § 17 a í løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu, sum loyvdi bóndum, jarðareigarum og leigarum at søkja um og fáa loyvi at skjóta grágás, sum er til ampa fyri landbúnaðin. Munur er tó á báðum ásetingunum, tí at nú verður tað eisini loyvt at skjóta brandgás, sum eins og grágásin í ein ávísan mun er vorðin til ampa fyri landbúnaðin.

Hetta merkir, at tann, sum eigur, festir ella leigar lendið, aftur kann søkja um loyvi at skjóta grágás og brandgás, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av gæsnum.

Trupulleikarnir, ið sipað verður til, er skaði á avgrøði, bæði gras og annan vøkstur, t.d. epli og grønmeti. Landsstýrismaðurin gevur út loyvi at skjóta grágás og brandgás og setur neyvar treytir við hesum loyvi. Loyvi at skjóta grágás og brandgás er treytað av, at umsøkjarin hevur vápnaloyvi og váttar at kenna fuglin, sum loyvið fevnir um.

Búnaðarstovan umsitur loyvini til at skjóta grágás og brandgás.

Til § 1, nr. 2
Ásett verður í § 17 b, at landsstýrismaðurin skal stíla fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás og brandgás verða framdar. Hetta merkir, at fuglateljingarnar og kanningarnar, sum eru av grágás halda fram, eins og at farið verður undir at fremja fuglateljingar og kanningar av brandgásini.

Til § 2

Áseting um gildiskomu. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samstundis verður ásett, at § 17 a fer úr gildi aftur 1. januar 2031. Sólseturásetingin fyri § 17 a er grundað á, at kanningar og vísindaligar teljingar skulu gerast tey komandi árini fyri ávikavist grágásastovnin og brandgásastovnin.

Vinnumálaráðið, 28. apríl 2026

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar Føroya Fuglafrøðifelag
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar Tjóðsavnið
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar Umhvørvisstovan
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar Bóndafelag Føroya
Fylgiskjal 6: Upprit um innkomnar viðmerkingar til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu (Fuglaveiðulógin)